# Dagført yvirlit yvir firvaldar (Lepidoptera) í Føroyum fram til 31. desember 2019

*Updated overview of Lepidoptera in the Faroe Islands, by 31 December 2019*

***Jens-Kjeld Jensen***[1] og ***Karl A. Thomsen***[2]

[1] í Geilini 37, FO-270 Nólsoy. Email: nolsoy@gmail.com

[2] í Tungu 7, FO-513 Syðrugøta. Email: karl.anfinn.thomsen@gmail.com

## Úrtak

Hesi seinastu tíggju árini eru tíggju nýggj sløg av firvaldum skrásett fyri fyrstu ferð í Føroyum, harav tey trý við vissu eru innslødd, t.e., eru ikki komin til landið av sær sjálvum. Tilsamans eru nú funnin 166 sløg í Føroyum, harav tey 23 eru innslødd. Umframt at kunna um tey nýggju sløgini, sum fyrstu ferð eru skrásett í Føroyum, og við nýggjum føroyskum nøvnum, dagførir hetta yvirlitið eisini tey sjáldsomu sløgini; tað eru tey sløgini, sum eru funnin færri enn 10 ferðir. Eisini dagførir yvirlitið nýggj oyggjarfund og longda flogtíð í mun til tað, sum stendur í bókini "Firvaldar – 155 ymiskir firvaldar í Føroyum" (Jensen og Sivertsen, 2010). Í teimum førum, har ongar viðmerkingar eru knýttar at navninum á slagnum, er støðan hin sama, sum tað, ið stendur í firvaldabókini.

## Abstract

In the past ten years, ten new species of Lepidoptera have been recorded for the Faroe Islands. Of these, three were introduced, meaning that they did not arrive naturally. This brings the total number of Lepidoptera species in the Faroe Islands to 166, of which 23 are introduced species.

In addition to informing about these new species for the Faroes Islands, mentioned with new Faroese names, this overview is also updated with new records of rare Lepidoptera species; it is, recorded less than 10 times in the Faroes Islands. The overview is also updated with respect to new island sightings and extended flight time compared to what was mentioned in the Faroese book "Firvaldar – 155 ymiskir firvaldar í Føroyum" (Jensen og Sivertsen, 2010). Where the Latin and Faroese names are cited without remarks, no changes have

accrued since the Faroese Lepidoptera book was published in 2010.

## Inngangur

Síðani bókin "Firvaldar – 155 ymiskir firvaldar í Føroyum" (Jensen og Sivertsen, 2010) varð útgivin, hevur firvaldaveiðan við ljósfellum og lokkidorgum her á landi verið rættiliga avmarkað og staðbundin. Bert ein ljósfella í garðinum hjá Karl A. Thomsen í Syðrugøtu, Eysturoy, hevur verið í regluligari nýtslu hesi árini. Umframt fund frá hesi ljósfellu, so stava fráboðanirnar í yvirlitinum frá fólki, sum antin hava sent firvaldar ella myndir av firvaldum inn til slaggreining hjá høvundunum. Allar upplýsingar, sum vit vita um, fram til 31. desember 2019, eru við í hesum yvirliti.

Frá tí at firvaldabókin hjá Jensen og Sivertsen (2010) kom út í 2010 og fram til 31. desember 2019, eru tvær greinar um føroyskar firvaldar givnar út: "Uglen *Plusia putnami* Grote (lille perlemormetalugle) fundet på Færøerne" (Jensen og Thomsen, 2013) og "Fund af nye og sjældne arter af Lepidoptera på Færøerne siden 2009" (Jensen og Thomsen, 2015).

Flokkingin og latínsku heitini eru sambært Karsholt og Razowski (1996), meðan føroysku firvaldaheitini eru sambært Jensen og Sivertsen (2010) og Patursson og Jensen (1998), umframt tíggju nýgjørd nøvn, sum høvundarnir hava evnað til, til nýggju sløgini.

Firvaldarnir eru í varðveitslu í persónligu søvnunum hjá Hans Eli Sivertsen, Karl A. Thomsen og Jens-Kjeld Jensen og á Tjóðsavninum.

"Nýggj útbreiðsla" merkir, at slagið fyri fyrstu ferð er skrásett at vera funnið í ávísari oyggj sambært Jensen og Sivertsen (2010). "Innsløtt slag" merkir, at kringumstøðurnar prógva ella týðiliga benda á, at firvaldurin er komin til landið við vøruflutningi.*Merkir, at slagið er skrásett at vera funnið fyri fyrstu ferð í Føroyum, eftir at bókin "Firvaldar – 155 ymiskir firvaldar í Føroyum" kom út í 2010 (Jensen og Sivertsen, 2010).

## HEPIALIDAE - Hulduættin

*Hepialus humuli* (Linnaeus, 1758)
**Hulda**

## TINEIDAE - Fjarðamølaættin

*Tineola bisselliella* (Hummel, 1823)
**Klæðishúsvætti**

*Tinea pallescentella* (Stainton, 1851)
**Húsvætti ljósa**
Nýtt slag í Svínoy
Svínoy, 16. aug. 2016.
Leg. Jens-Kjeld Jensen

*Monopis laevigella*
(Denis og Schiffermüller, 1775)
**Húsvætti svarta**

## GRACILLARIIDAE - Vænmølaættin

*Caloptilia betulicola* (M. Hering, 1928)
**Birkiviggmølur**

*Caloptilia elongella* (Linnaeus, 1761)
**Viggmølur**. Innsløtt slag
Hoyvík, Streymoy, 10. - 17. sep. 1995 (Kaaber, 1997)
Var ikki við í Jensen og Sivertsen (2010)

*Aspilapteryx tringipennella* (Zeller, 1839)
**Gøtubráarmølur**

## YPONOMEUTIDAE - Spunaramølaættin

*Yponomeuta evonymella* (Linnaeus, 1758)
**Diglutur mølur**

## PLUTELLIDAE - Kálmølaættin

*Plutella xylostella* (Linnaeus, 1758)
**Kálmølur**
Longd flogtíð: 15. mai - 14. nov.

*Rhigognostis senilella* (Zetterstedt, 1839)
**Skriðublómumølur**

*Rhigognostis annulatella* (Curtis, 1832)
**Eirisgrasmølur**

## DEPRESSARIIDAE - Flatmølaættin

*Depressaria badiella* (Hübner, 1796)
**Flatmølur**

## ELACHISTIDAE - Sløkjumølaættin

*Elachista albidella* (Nylander, 1848)
**Fípumølur**

## OECOPHORIDAE - Húsvættaættin

*Endrosis sarcitrella* (Linnaeus, 1758)
**Húsvætti gráa**

*Hofmannophila pseudospretella*
(Stainton, 1849)
**Húsvætti brúna**

*Oecophora bractella* (Linnaeus, 1758)
**Framgulur mølur.** Innsløtt slag

## COLEOPHORIDAE - Bjølgamølaættin

*Coleophora serratella* (Linnaeus, 1761)
**Birkimølur**. Innsløtt slag

*Coleophora glaucicolella* (Wood, 1892)
**Sevmølur**

*Coleophora asteris* (Mühlig, 1864)
**Astersmølur**

*Coleophora versurella* (Zeller, 1849)
**Rímbløðkumølur**

## GELECHIIDAE - Glermølaættin

*Euscrobipalpa samadensis* (Pfaff, 1870)
**Sævargøtubráarmølur**

*Phthorimaea operculella* (Zeller, 1873)
**Eplamølur**. Innsløtt slag

## TORTRICIDAE - Vevjaraættin

*Aethes smeathmanniana* (Fabricius, 1781)
**Røliksvevjari**

*Acleris comariana* (Lienig og Zeller, 1846)
**Jarðberjavevjari**

*Acleris maccana* (Treitschke, 1835)
**Bláberjavevjari**

*Acleris sparsana*
(Denis og Schiffermüller, 1775)
**Línvevjari**
Nýtt slag í Eysturoy
Syðrugøta, Eysturoy, 21. sep. 2016.
Leg. Karl A. Thomsen
Longd flogtíð: 20. aug. - 16. okt.

*Acleris aspersana*
(Denis og Schiffermüller, 1775)
**Muruvevjari**

*Acleris notana* (Donovan, 1806)
**Birkivevjari lítli**

*Eana osseana* (Scopoli, 1763)
**Grasfirvaldur lítli**

*Cacoecimorpha pronubana* (Hübner, 1799)
**Neliksvevjari**. Innsløtt slag

*Bactra lancealana* (Hübner, 1799)
**Sevvevjari**

*Phiaris schulziana* (Fabricius, 1776)
**Lyngvevjari**

*Lobesia littoralis*
(Westw. og Humph., 1845)
**Sjógrasvevjari**

*Epinotia caprana* (Fabricius, 1798)
**Pílavevjari**
Nýtt slag í Eysturoy
Syðrugøta, Eysturoy, 22. aug. 2016.
Leg. Karl A. Thomsen

*Epinotia solandriana* (Linnaeus, 1758)
**Birkivevjari stóri**

*Epinotia mercuriana* (Frølich, 1828)
**Brúðarvevjari**

*Zeiraphera griseana* (Hübner, 1799)
**Furuvevjari**

*Cydia deshaisiana* (Lucas, 1858)
**Lopvevjari**. Innsløtt slag

## PTEROPHORIDAE - Bløkumølaættin

* *Platyptilia gonodactyla* (Denis og Schiffermüller, 1775)
**Hóvblaðsbløkumølur**
Viðareiði, Viðoy, 25. juli 2014. Leg. Gert Norðoy (Jensen og Thomsen, 2015)
Ormveran livir á lodnum hóvblaði *Tussilago farfara* (Linnaeus)



Mynd 1: Hóvblaðsbløkumølur, *Platyptilia gonodactyla*. Viðareiði, Viðoy, 25. juli 2014 (Mynd: Jens-Kjeld Jensen).

*Gillmeria pallidactyla* (Haworth, 1811)
**Ljósur bløkumølur**

*Amblyptilia acanthadactyla* (Hübner, 1813)
**Morreyður bløkumølur**
Nýtt slag í Suðuroy
Tvøroyri, 20. okt. 2016.
Leg. Turið Vestergaard
Er nú funnin 7 ferðir

*Stenoptilia bipunctidactyla* (Scopoli, 1763)
**Bløkumølur**

*Emmelina monodactyla* (Linnaeus, 1758)
**Fjøðurmølur**

Nýtt slag í Eysturoy
Skála, 22. okt. 2016. Leg. Magni Thomsen
Er nú funnin 6 ferðir

## PYRALIDAE - Grasmølaættin

*Paralipsa gularis* (Zeller, 1877)
**Suðurfruktarmølur**. Innsløtt slag

*Dioryctria abietella*
(Denis og Schiffermüller, 1775)
**Kongulmølur**

* *Agonopterix heracliana* (Linnaeus, 1758)
**Sløkjumølur**. Innsløtt slag
Tórshavn, Streymoy, 8. nov. 2012.
Leg. Hans Eli Sivertsen



Mynd 2: Sløkjumølur *Agonopterix heracliana*. Tórshavn, Streymoy, 8. november 2012 (Mynd: Jens-Kjeld Jensen).

*Plodia interpunctella* (Hübner, 1813)
**Kornmølur**. Innsløtt slag

*Anagasta kuehniella* (Zeller, 1879)
**Mjølhúsvætti**. Innsløtt slag
Nýtt slag í Nólsoy
Nólsoy, 22. des. 2018

*Scoparia ambigualis* (Treitschke, 1829)
**Eingjarmølur**

*Crambus pascuella* (Linnaeus, 1758)
**Eingjargrasmølur**

*Crambus ericella* (Hübner, 1813)
**Hagagrasmølur**

*Crambus perlella* (Scopoli, 1763)
**Silvurgrasmølur**

*Catoptria margaritella*
(Denis og Schiffermüller, 1775)
**Perlugrasmølur**

*Catoptria furcatellus* (Zetterstedt, 1839)
**Fjallagrasmølur**

*Udea ferrugalis* (Hübner, 1796)
**Grasmølur guli**

*Udea lutealis* (Hübner, 1809)
**Tistilmølur**

*Margaritia sticticalis* (Linnaeus, 1761)
**Dimmimølur**

*Duponchelia fovealis* (Zeller, 1847)
**Tulipanmølur.** Innsløtt slag

*Nomophila noctuella*
(Denis og Schiffmüller, 1775)
**Ferðamølur**

## LASIOCAMPOIDAE - Pesjaættin

*Euthrix potatoria* (Linnaeus, 1758)
**Leskipesja.** Innsløtt slag

## SPHINGIDAE - Kvøldsveimaraættin

*Smerinthus o. ocellata* (Linnaeus, 1758)
**Eygadrotningarfirvaldur.** Innsløtt slag

*Agrius convolvuli* (Linnaeus, 1758)
**Kongsfirvaldur**
Longd flogtíð: 24. juni - 7. okt.

*Acherontia atropos* (Linnaeus, 1758)
**Náhøvur**

*Macroglossum stellatarum* (Linnaeus, 1758)
**Lítil drotningarfirvaldur**
Nýtt slag í Streymoy
Hoyvík, 14. juni 2014. Obs. Jákup Dahl
Tórshavn, 11. aug. 2018. Obs. Dánial Jespersen
Nýtt slag í Eysturoy
Syðrugøta, Eysturoy, 12. juni 2017. Mynd Birita Jarnskor
Syðrugøta, Eysturoy, 3. aug. 2018. Mynd Birita Jarnskor
Skála, 3. aug. 2018. Mynd Heri Kallsoy
Nýtt slag í Mykinesi
Mykines, 2. aug. 2018. Leg. Hans Meinhard í Eyðansstovu
Er nú funnin 9 ferðir

*Hyles gallii* (Rottemburg, 1775)
**Drotningarfirvaldur**
Strendur, 9. juli 2011. Mynd Eva Andersen (Jensen og Thomsen, 2015)
2 sjómíl eystur úr Lítlu Dímun, 8. juli 2011. Leg. Sonne Johannesen (Jensen og Thomsen, 2015)
Fuglafjørður, 2. aug. 2018. Filmsbrot Benjamin Sikivat
Er nú funnin 8 ferðir

*Hyles livornica* (Esper, 1780)
**Strípútur drotningarfirvaldur**
Nýtt slag í Nólsoy
Nólsoy, 31. mai 2009, (Jensen og Thomsen, 2015)
Er nú funnin 5 ferðir

*Deilephila elpenor* (Linnaeus, 1758)
**Elpenordrotningarfirvaldur**. Innsløtt slag

## PIERIDAE - Fiðrildaættin

*Pieris rapae* (Linnaeus, 1758)
**Snjófiðrildi**. Innsløtt slag
Nýtt slag í Sandoy, Eysturoy, Borðoy og Viðoy

*Pieris napi* (Linnaeus, 1758)
**Grønteinut fiðrildi.** Innsløtt slag

## NYMPHALIDAE - Álvaættin

*Vanessa atalanta* (Linnaeus, 1758)
**Admirálur**

*Vanessa cardui* (Linnaeus, 1758)
**Tistilfirvaldur**
Nýtt slag í Fugloy
Hattarvík, 20. juni 2019. Leg. Karl A. Thomsen
Longd flogtíð: 3. mars. - 18. okt.

*Inachis io* (Linnaeus, 1758)
**Páfirvaldur**

*Aglais urticae* (Linnaeus, 1758)
**Notufirvaldur**

## GEOMETRIDAE - Spannaraættin

*Abraxas grossulariata* (Linnaeus, 1758)

**Skjóruspannari**
Longd flogtíð: 27. mai - 29. aug.

*Timandra comae* (A. Schmidt, 1931)
**Timandraspannari**
Nýtt slag í Eysturoy
Syðrugøta, Eysturoy, 3. aug. 2018.
Leg. Karl A. Thomsen
Nýtt slag í Vágum
Sørvágur, 29. juli 2019. Leg. Rodmund á Kelduni
Er nú funnin 6 ferðir

* *Rhodometra sacraria* (Linnaeus, 1767)
**Brúðarspannari**
Syðrugøta, Eysturoy, 19. sep. 2016.
Leg. Karl A. Thomsen



Mynd 3: Brúðarspannari *Rhodometra sacraria*. Syðrugøta, Eysturoy, 19. september 2016 (Mynd: Karl A. Thomsen).

*Orthonama obstipata* (Fabricius, 1794)
**Miðjarðarhavsspannari**

*Xanthorhoe designata faeroensis* (Wolf 1929)
**Várspannari**
Ílegukanning av føroyska várspannaranum vísir, at eingin munur er á arvastronginum á føroyska slagnum og tí í Stórabretlandi. Munurin á arvastreinginum á føroyska slagnum og tí í Niðurlondum, Týsklandi og Fraklandi er bert 1/658 bp. Men sjónska litfrábrigdið og serliga veingjamynstrið ger føroyska várspannaran til egið undirslag *faeroensis* (Hausmann, 2012).
Longd flogtíð: 5. mai - 28. aug.

*Xanthorhoe decoloraria* (Esper, 1806)
**Skøruspannari**

*Xanthorhoe fluctuata* (*Linnaeus, 1758*)
**Kálspannari**
Nýtt slag í Streymoy
Longd flogtíð: 12. mai - 6. sep.

*Entephria caesiata*
(Denis og Schiffermüller, 1775)
**Klettaspannari**
Nýtt slag í Borðoy
Klaksvík, 25. aug. 2017. Leg. Eskild Hansen

*Pelurga comitata* (Linnaeus, 1758)
**Leirspannari**

*Chloroclysta siterata* (Hufnagel, 1767)
**Eikispannari**

*Chloroclysta miata* (Linnaeus, 1758)
**Jaspisspannari**
Nýtt slag í Eysturoy
Syðrugøta, Eysturoy, 24. sep. 2011. Leg. Karl A. Thomsen
Longd flogtíð: 24. sep. - 2. okt.

*Chloroclysta citrata* (Linnaeus, 1761)
**Marmorspannari**

*Chloroclysta truncata* (Hufnagel, 1767)

**Bogaspannari**
Nýggj útbreiðsla
Hoyvík, Streymoy, 2015. Fekk avkom. Leg. Annleyg Patursson
Syðrugøta, Eysturoy, 2015, 2016, 2017, 2018 og 2019. Fekk avkom.
Leg. Karl A. Thomsen
(Jensen og Thomsen, 2015)
Tórshavn, Streymoy, 25. juli 2019.
Mynd Erla Berghamar, 1 lívvera
Leirvík, Eysturoy, 27. juli 2019.
Mynd Jógvan Fróði Hansen, 2 lívverur
Longd flogtíð: 9. juli - 19. aug.

*Thera cognata* (Thunberg, 1792)
**Svínoyarspannari**

**Triphosa dubitata* (Linnaeus, 1758)
**Purpurspannari**
Hoyvík, Streymoy, 29. okt. 2017. Leg. Annleyg Patursson



Mynd 4: Purpurspannari *Triphosa dubitata*. Hoyvík, Streymoy, 29. oktober 2017 (Mynd: Annleyg Patursson).

*Operophtera brumata* (Linnaeus, 1758)
**Frostspannari**
Nýtt slag í Sandoy
Sandur, 2. des. 2019. Leg. Hanna Joensen
Longd flogtíð: 12. okt. - 14. des.

*Perizoma blandiata*
(Denis og Schiffermüller, 1775)
**Eingjarspannari**

*Perizoma albulata*
(Denis og Schiffermüller, 1775)
**Summarspannari**

*Perizoma didymata* (Linnaeus, 1758)
**Heystspannari**
Nýtt slag í Skúvoy
Skúvoy, 10. aug. 2005.
Leg. Jens-Kjeld Jensen
Nýtt slag í Stóru Dímun
Stóra Dímun, aug. 1995.
Leg. Kinna úr Dímun

*Eupithecia venosata* (Fabricius, 1787)
**Netspannari**

*Eupithecia satyrata curzoni* (Gregson, 1884)
**Lyngspannari**
Longd flogtíð: 19. mai - 2. juli.

*Eupithecia absinthiata* (Clerck, 1758)
**Frammansneiddur spannari**

*Eupithecia millefoliata* (Rössler, 1866)
**Rárur spannari**

*Eupithecia nanata zebrata* (Wolf, 1929)
**Dvørgspannari**

*Eupithecia pusillata*
(Denis og Schiffermüller, 1775)
**Baraldsspannari**

## NOCTUIDAE Heygsmannaættin

*Catocala fraxini* (Linnaeus, 1758)
**Blábendil**

*Scoliopteryx libatrix* (Linnaeus, 1758)
**Skarðvongur**
Syðrugøta, Eysturoy, 16. sep. 2016. Leg. Karl A. Thomsen
Syðrugøta, Eysturoy, 17. sep. 2017. Leg. Karl A. Thomsen
Er nú funnin 12 ferðir

*Rivula sericealis* (Scopoli, 1763)
**Grasmølavongur**

*Plusia festucae* (Linnaeus, 1758)
**Gliturvongur**

**Plusia putnami* (Grote, 1873)
**Lítil gliturvongur**
Syðrugøta, Eysturoy, 30. juli 2011. Leg. Karl A. Thomsen
Syðrugøta, Eysturoy, 23. juli 2013 (Jensen og Thomsen, 2013)



Mynd 5: Lítil gliturvongur *Plusia putnami*. Syðrugøta, Eysturoy, 23. juli 2013 (Mynd: Karl A. Thomsen).

*Autographa gamma* (Linnaeus, 1758)
**Gammavongur**
Ormveran er nú eisini funnin á dild *Anethum graveolens* (Linnaeus, 1758) 24. aug. 2006 og *á* hestamyntu *Mentha aquatica* (Linnaeus, 1753) 13. sep. 2018 á Sandi. Leg. Hanna Joensen.
Longd flogtíð: 14. mai - 17. nov.

*Autographa pulchrina* (Haworth, 1809)
**Korkavongur**

*Syngrapha interrogationis* (Linnaeus, 1758)
**Rekavongur**

**Amphipyra pyramidea* (Linnaeus, 1758)
**Koparvongur**
Syðrugøta, Eysturoy, 27. juli 2018. Leg. Karl A. Thomsen



Mynd 6: Koparvongur *Amphipyra pyramidea*. Syðrugøta, Eysturoy, 27. juli 2018 (Mynd: Karl A. Thomsen).

*Amphipyra tragopoginis* (Clerck, 1759)
**Músarvongur**

**Heliothis peltigera* (Denis og Schiffermüller, 1775)
**Okkurvongur**.
Viðareiði, Viðoy, 4. juni 2009. Leg. Dánial Jespersen (Jensen og Thomsen, 2015).



Mynd 7: Okkurvongur *Heliothis peltigera*. Viðareiði, Viðoy, 4. juni 2009 (Mynd: Jens-Kjeld Jensen).

**Helicoverpa armigera* (Hübner, 1808)
**Stríðsvongur**. Innsløtt slag
2 ormverur funnar í einum keyptum blómutyssi 15. jan. 2019. Leg. Ása á Mýrini, Tórshavn. Tann eina ormveran varð klakt 24. feb. 2019.



Mynd 8: Stríðsvongur *Helicorverpa armigera*. Tórshavn, Streymoy, 24. februar 2019 (Mynd: Karl A. Thomsen).

*Paradrina clavipalpis* (Scopoli, 1763)
**Mjølvongur.** Innsløtt slag

*Spodoptera exigua* (Hübner, 1808)
**Mjávongur**

*Phlogophora meticulosa* (Linnaeus, 1758)
**Skreytvongur**
Ormvera funnin á kollutari baldursbrá (*Chamomilla suaveolens*), klakt. Leg. Hanna Joensen, Sandur 2019.
Longd flogtíð: 26. feb. - 29. des.

*Enargia paleacea* (Esper, 1788)
**Sóljuvongur**

*Parastichtis suspecta* (Hübner, 1817)
**Øspvongur**
Syðrugøta, Eysturoy, 3. aug. 2019. Leg. Karl A. Thomsen
Er nú funnin 3 ferðir

*Xanthia icteritia* (Hufnagel, 1766)
**Gulvongur**

*Agrochola circellaris* (Hufnagel, 1766)
**Morvongur**
Longd flogtíð: 8. aug. - 19. okt.

*Eupsilia transversa* (Hufnagel, 1766)
**Mánavongur**
Nýtt slag í Vágum
Sørvágur, 8. nov. 2015. Leg. Rodmund á Kelduni
Longd flogtíð: 8. mars - 4. jan.

*Lithomoia solidaginis* (Hübner, 1803)
**Aðalbláberjavongur**

*Lithophane socia* (Hufnagel, 1766)
**Felagsvongur**

*Xylena vetusta* (Hübner, 1813)
**Kjarrvongur**
Longd flogtíð: 27. mars - 21. nov.

*Xylena exsoleta* (Linnaeus, 1758)
**Viðarvongur**

*Mniotype adusta* (Esper, 1790)
**Landnámsfirvaldur**
Longd flogtíð: 19. mai - 21. aug.

*Apamea monoglypha* (Hufnagel, 1766)
**Grasfirvaldur stóri**
Er nú millum vanligastu heygsmenn í Eysturoy

*Apamea crenata* (Hufnagel, 1766)
**Flekkuvongur**

*Abromias assimilis jenskjeldi* (Doubleday, 1847)
**Rossafirvaldur**

*Apamea remissa* (Hübner, 1809)
**Sprøkluvongur**

*Mesapamea secalella* (Remm, 1983)
**Tvíburavongur**

*Photedes minima (*Haworth, 1809)
**Deplutur vongur**
Nýtt slag í Eysturoy
Syðrugøta, Eysturoy, 8. aug. 2015, (kalldýr). Leg. Karl. A. Thomsen
Er nú funnin 2 ferðir

*Rhizedra lutosa* (Hübner, 1803)
**Fenvongur**

*Amphipoea fucosa* (Freyer, 1830)
**Grýluvongur**

*Amphipoea crinanensis* (Burrows, 1908)
**Royðuvongur**

*Hydraecia micacea* (Esper, 1789)
**Mækjuvongu**r
Slagið fær helst javnan avkom undan í Føroyum
Í 2010 vóru 93 mækjuveingir funnir í Hovi, Suðuroy. Leg. Maria Jensen
Longd flogtíð: 30. juli - 22. sep.

*Celaena haworthii* (Curtis, 1829)
**Fípuvongur**

*Helotropha leucostigma* (Hübner, 1808)
**Heiðavongur**
Flogtíð: 30. juli - 28. aug.

*Hypocoena stigmatica dispersa* (Wollf, 1970)
**Sandvongur**

*Anarta trifolii* (Hufnagel, 1766)
**Vøkkulvongur**
Nýtt slag í Eysturoy
Syðrugøta, Eysturoy, 1. aug. 2012.
Leg. Karl Thomsen
Er nú funnin 9 ferðir

*Lacanobia oleracea* (Linnaeus, 1758)
**Grønmetisvongur**

*Hada plebeja* (Linnaeus, 1761)
**Tannavongur**
Longd flogtíð: 15. mai - 26. juni.

*Mamestra brassicae* (Linnaeus, 1758)
**Klóvongur**

*Mythimna pallens* (Linnaeus, 1758)
**Hálmvongur**

*Mythimna unipuncta* (Haworth, 1809)
**Rótarvongur**

**Orthosia gothica* (Linnaeus, 1758)
**Nunvongur**
Syðrugøta, Eysturoy, 20. apr. - 10. mai 2015 tilsamans 12 eint.,
(Jensen og Thomsen, 2015)
Syðrugøta, Eysturoy, 3. mai - 10. mai 2016 tilsamans 2 eint.
Leg. Karl A. Thomsen
Syðrugøta, Eysturoy, 3. mai - 7. mai 2017 tilsamans 9 eint.
Leg. Karl A. Thomsen
Syðrugøta, Eysturoy, 26. apr. - 12. mai 2018 tilsamans 8 eint.
Leg. Karl A. Thomsen
Syðrugøta, Eysturoy, 18. apr. - 19. mai 2019 tilsamans 32 eint.
Leg. Karl A. Thomsen
Slagið hevur nýliga sett búgv í Føroyum
Flogtíð: 18. apr. - 19. mai.



Mynd 9: Nunvongur *Orthosia gotica.* Syðrugøta, Eysturoy, 12. mai 2018 (Mynd: Karl A. Thomsen).

*Cerapteryx graminis* (Linnaeus, 1758)
**Ormafirvaldur**

*Diarsia mendica thulei* (Staudinger, 1891)
**Roðavongur**
Longd flogtíð: 12. mai - 21. aug.

*Diarsia rubi* (Vieweg, 1790)
**Rubivongur**
Nýtt slag í Eysturoy
Syðrugøta, Eysturoy, 19. mai 2011. Leg. Karl A. Thomsen
Er nú funnin 2 ferðir

*Noctua pronuba* (Linnaeus, 1758)
**Veingjaguli**

*Noctua orbona* (Hufnagel, 1766)
**Blettvongur**

*Noctua comes* (Hübner, 1813)
**Lítli veingjaguli**. Innsløtt slag

*Lycophotia porphyrea*
(Denis og Schiffermüller, 1775)
**Porfýrvongur**

*Standfussiana lucernea* (Linnaeus, 1758)
**Steinbrotsvongur**

*Eurois occulta* (Linnaeus, 1758)
**Mosavongur**

*Graphiphora augur* (Fabricius, 1775)
**Tyrnivongur**

*Xestia alpicola alpina*
(Humphreys og Westwood, 1843)
**Bláberjavongur**

*Xestia c-nigrum*, (Linnaeus, 1758)
**Kulluvongur**
Slagið fær helst avkom í Føroyum summi ár
Longd flogtíð: 20. apr. - 25. sep.

**Xestia baja* (Denis og Schiffermüller, 1775)
**Rossaberjavongur**
Syðrugøta, Eysturoy, 30. juli 2019.
Leg. Karl A. Thomsen



Mynd 10: Rossaberjavongur *Xestia baja*. Syðrugøta, Eysturoy, 30. juli 2019 (Mynd: Karl A. Thomsen)

*Anaplectoides prasina*
(Denis og Schiffermüller, 1775)
**Bordavongur**

*Peridroma saucia* (Hübner, 1808)
**Opalvongur**

*Euxoa cursoria* (Hufnagel, 1766)
**Dunnuberjavongur**

*Agrotis ipsilon* (Hufnagel, 1766)
**Perluvongur**
Longd flogtíð: 23. feb. - 19. nov.

*Agrotis segetum*
(Denis og Schiffermüller, 1775)
**Akurvongur**

## ARCTIIDAE Miklingaættin

*Atolmis rubricollis* (Linnaeus, 1758)
**Reyðnakki.** Innsløtt slag

*Phragmatobia fuliginosa* (Linaeus, 1758)
**Kanelvongur**. Innsløtt slag
Nýtt slag í Suðuroy
Trongisvágur, 28. des. 2013.
Leg. Turið Vestergaard, klaktur frá innsløddari ormveru
Er nú funnin 2 ferðir

*Arctia caja* (Linnaeus, 1758)
**Tikaravongur**
Nýtt slag í Nólsoy
Nólsoy, 3. juli 2010. Leg. Birthe Nedergaard (Jensen og Thomsen, 2010)

*Tyria jacobaeae* (Linnaeus, 1758)
**Tyriavongur.** Innsløtt slag

*Antichloris viridis* (Druce, 1884)
**Bananvongur.** Innsløtt slag

## Tøkk

Vit takka Ole Karsholt fyri hjálp at slaggreina tey nýggju sløgini. Serstaka tøkk bera vit Annleyg Patursson, Mariu Jensen, Dánial Jespersen, Hannu Joensen, Rodmund á Kelduni, Hans Eli Sivertsen og Turið Vestergaard fyri innsendar eygleiðingar. Teimum báðum Jón Aldará og Janus L. Hansen takka vit fyri nágreiniligan lestur og virðismikar viðmerkingar til handritið.

## Heimildir

Hausmann, A. (2012). *Geometrid Moths of Europe*. Vol 3. Hausmann, A. og J. Viidalepp: Larentinae I. pp. 743.

Jensen, J-K. og Sivertsen, H. E. (2010). *Firvaldar - 155 ymiskir firvaldar í Føroyum*. Føroya skúlabókagrunnur. Tórshavn. pp. 1-208.

Jensen, J-K. og Thomsen, K. A. (2013). Uglen *Plusia putnami* Grote (lille perlemor-metalugle) fundet på Færøerne. *Lepidoptera* 6. pp. 223-224.

Jensen, J-K. og Thomsen, K. A. (2015). Fund af nye og sjældne arter af Lepidoptera på Færøerne siden 2009. *Lepidoptera* bind X nr. 10, 2015. pp. 382-385.

Kaaber, S. (1997). An annotated list of Lepidoptera known from the Faroe Islands. Nágreiniligt yvirlit yvir firvaldar í Føroyum. *Fróðskaparrit* 45: pp. 97-106.

Karsholt, O. og Razowski, J. (1996). *The Lepidoptera of Europe*. Apollo Books. Stenstrup. pp. 1-380.

Patursson, A. og Jensen, J-K. (1998). Nøvn til firvaldar (Lepidoptera). *Føroya fuglafrøð*ifelag. 12. árg. pp. 9-12..